**Vinnuhúsið**

# Grundgeving fyri Ársins Átak 2008

Ársins Átak verður valt fyri at heiðra virki ella persón, sum hevur gjørt serligt átak, ið kann gagna vinnuligum framburði. Sjálvt um stígur er í heimsbúskapinum, sum kenst aftur her í Føroyum, fegnast dómsnevndin um, at eisini í 2008 hevur verið úr at velja. Vit kunnu samstundis fegnast um, at so nógv hendir innan nýggju og kreativu vinnurnar. Vit síggja og uppliva nýtt fyritaksemi, samstarv og váðafús tiltøk innan sniðgeving, ferðavinnu, reklamuvirksemi og kunningartøkni.

Tað er farið at leka alt meira millum teori og praksis, millum gransking og vinnu, millum akademia og gerandisdagin. Vinnan, hevur tikið stig til at nýta fróðskaparsetursvitan at kanna um vágiligar hugsanir og loysnir bera í verki. Granskarar royna um somu tíð, um teirra hugsan og teori ber í dagligari og vinnuligari roynd. Nógvar av hesum royndum miseydnast og fara at miseydnast. Men hvør roynd, annaðhvørt hon eydnaðist ella miseydnaðist, gevur vitan og er undangonga, sum vit fylgja ella vilja gera betri.

Gransking er ikki nýggj í Føroyum. Tað nýggja er, at gransking verður ikki longur bert gjørt av hugaðum leikum og lærdum eftir loknan arbeiðsdag. Vit hava fingið granskingarstovnar, har avlærdir granskarar burturav kanna, útgreina og lýsa fyrr ógreind viðurskifti. Tað er eisini nýtt, at gerandisdagur og gransking eru farin at nærkast hvør øðrum. Vit liva í einum vitanarsamfelagi, har kend vitan er mestsum algongd. Av tí sama veksur tørvurin á nýggjari vitan ekplosivt, tí tað er jú nýggj vitan og nýggj nýtsla av vitan, ið ber framtíðar kappingarføri hjá fyritøkum í sær – ja, ofta er grundarlagið undir nýggjum kappingarførum fyritøkum, ið vitan og kapitalur hava funnið saman at ment.

Tað er hesa jaligu gongd í føroyskari vinnulívsmenning, ið nevndin at velja Ársins Átak hevur valt at taka fram. At hugskot, sprottin úr granskingarumhvørvi, kennast so mikið verd í vinnuligum høpi, at vinnan setir pening í menningina av hugskotinum, einans við teirri trygd, at hon fær sín ágóða, um hugskotið ber sum ætlað.

Sum umboð fyri hesa jaligu gongd hevur dómsnevndin valt Sp/f Decision3 til Ársins Átak 2008.

Decision3 varð stovnað á vári 2006 at fara undir eina granskingarætlan, sum hevði til endamáls at menna eina skipan, sum ger tað møguligt at máta dýpdargangin hjá einum skipi og samstundis máta bylgjurnar rundan um skipið. Harafturat var eisini eitt langtíðarmál at nýta nýggju mátingarnar til orkusparing.

Granskingarætlanin varð frá byrjan stuðlað av Granskingarráði Føroya, Vinnuframagrunninum og Amerada Hess. Frá einum persóni er virkið og granskingarætlanin

# Grundgeving fyri Ársins Átak 2008

vaksin til 4 fólk. Royndir við skipanini umborð á Smyrli hava víst góða orkusparing, og í vár varð avtala gjørd við stóra danska reiðarafelagið Dampskibselskabet Norden A/S um at seta eina royndarskipan í nýtt skip, sum verður bygt í Kina, og skipanin verður installerað har yviri í løtuni. Hendan skipan er um at vera liðugt ísett og fer vónandi at vísa góð úrslit í nærmastu framtíð. Samstarvsavtala er gjørd við Norden um fleiri leveringar, um hendan eydnast væl.

Hetta er undangonga við lít, og tí hevur dómsnevndin gjørt av, at heiðra virkið, stuðlar og íleggjarar og mongu ráðgevararnar við Ársins Átaki 2008.